UTTAN ÚR HEIMI

## Gongur væl hjá Pan Fish

Tað gongur nógv betur fíggjarliga hjá stóru norsku alifyritøkuni Pan Fish, enn tey flestu høvdu væntað.

Fyrradagin almannakunngjørdi fyritøkan roknskapin fyri juli ársfjórðing. Hann vísti, at raksturin hevði givið 97,8 milliónir krónur í avlopi teir tríggjar mánaðarnar. Tað svaraði til næstan 20 prosent av søluni, og so góðum úrsliti hevði norski fíggjarheimurin ikki roknað við, skrivar Aftenposten.

Atli Eide, stjóri í Pan Fish, sigur, at nú er vend komin í hjá fyritøkuni. Fleiri tillagingar og umskipanir eru framdar, og tað hevur millum annað havt við sær, at í dag kostar tað Pan Fish 19,17 norskar krónur at virka eitt kilo av aldum laksi. Men fyritøkan hevur sett sær fyri at fáa framleiðslukostnaðin uppaftur longri niður, sigur stjórin.

## Handilsstríð í ES

Tað gongst illa hjá ES-londunum um at semjast um ein felags politikk í sambandi við fríhandilssamráðingarnar hjá altjóða handilsfelagsskapinum WTO.

Týsdagin skuldi landbúnaðarkommiserurin, danska Mariann Fischer Boel, greiða landbúnaðarráðharrunum frá, hvussu langt samráðingarnar í WTO eru komnar, men tað vísti seg, at tey fronsku umboðini vóru ikki bara komin til Luksenburg at lurta. Franska stjórnin ber ótta fyri, at Mariann Fischer Boel og handilskommiserurin, bretin Peter Mandelson, eru til reiðar at slaka á landbúnaðarøkinum fyri at útvega ídnaðinum í ES betri útflutningsmøguleikar.

Mariann Fischer Boel royndi at sissa fransmenninar. Hon segði, at hon slakar ikki meiri á landbúnaðarøkinum, enn ES-nevndin hevur givið henni heimild til, men hon legði tó afturat, at nevndin kannar í løtuni, um tað ber til at geva landbúnaðarvørum úr øðrum londum betri marknaðaratgongd. Men so skulu hinir partarnir í WTO-samráðingunum eisini slaka á øðrum økjum afturfyri, segði hon. Tað er ógreitt, um hetta var nóg mikið til at sissa fransmenn, sum eru sera eymir í landbúnaðin.

## Skera inn á bein

Í Týsklandi eru teir kristiligu demokratarnir og sosialdemokratarnir vorðnir samdir um at spara 35 milliardir evrur ella einar 250 milliardir krónur á fíggjarlógini tey bæði næstu árini.

So stórar sparingar hava týskir politikarar ikki framt fyrr, men komandi kanslarin, Angela Merkel, sigur tær vera neyðugar orsakað av tí politikki, sum fráfarandi stjórnin hevur rikið tey seinastu sjey árini. Harvið gevur hon sosialdemokratunum skyldina av, at tað er neyðugt at spara so nógv. Ein stór orsøk til sparingarnar er, at tað verður nógv dýrari at umskipa týska arbeiðsmarknaðin, enn fráfarandi stjórnin hevði væntað.

Spurningurin er so, hvussu rokningin skal gjaldast. Teir kristiligu demokratarnir hava fyrr skotið upp at hækka meirvirðisgjaldið úr 16 í 18 prosent, men nú ljóðar, at tað kanska endar uppi á 20 prosentum. Samstundis er greitt, at fleiri skattafrádráttir so sum ferðafrádrátturin verða strikaðir, og at kolanámsvinnan missir ein part av tí almenna stuðulinum.

## Norðmaður smuglaði

Løgreglan í Teilandi hevur tikið ein 38 ára gamlan norðmann og skuldsett hann fyri at hava smuglað rúsevni.

Sambært norska útvarpinum varnaðist løgreglan á frítíðarstaðnum Pattaya, at alt ruggaði ikki rætt við norðmanninum, og tá løgreglumenninir kannaðu mannin, vísti tað seg, at hann hevði 30 gram av rúsevninum marihuana uppi á sær. Hann varð alt fyri eitt tikin og settur í varðhald.

Sambært norska sendimanninum í Teilandi hevur maðurin greitt frá, at hann hevði keypt rúsevnið í Teilandi, og at hann ætlaði sær at brúka tað sjálvur. Júst tað kann fáa avgerandi týdning fyri málið, tí koma myndugleikarnir til ta niðurstøðu, at norðmaðurin ætlaði sær at selja rúsevnið, kann hann fáa deyðarevsing.

# Misti konuna og børnini og skal nú í fongsul

**Vitalij Kalojev misti konuna og bæði børnini, tá eitt russiskt og eitt týskt flogfar stoyttu saman uppi yvir Suðurtýsklandi. Fyri at hevna tey trý myrdi hann danska flúgvileiðaran, sum eftir hansara tykki hevði skyldina av vanlukkuni. Nú skal hann í fongsul fyri morðið**

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Í kirkjugarðinum í Vladikavkaz stendur hesin steinurin stendur á grøvini hjá Svetlanu og teimum báðum børnunum*

*Mynd: POLFOTO*

Tann 1. juli í 2002 var russiski arkitekturin Vitalij Kolajev spentur. Hann arbeiddi í Spania, og hendan dagin skuldu konan og bæði børnini koma hagar at vitja hann.

Men flogfarið, sum konan Svetlana, tíggju ára gamli Konstantin og fýra ára gamla Diana vóru við, kom ongantíð til Spania. Uppi yvir Suðurtýsklandi stoytti tað sama við eitt týskt flutningsflogfar, og øll doyðu. Um tað mundið, vanlukkan hendi, hevði flogeftirlitið í Zúrich ábyrgdina av trygdini í luftini, og tað var danski flúgvileiðarin Peter Nielsen, sum hevði vakt hesa løtuna.

Vitalij Kolajev var frá sær sjálvum, og í februar í 2004 gjørdi hann av at taka lógina í egnar hendur. Hann fór til Sveis, har hann myrdi Peter Nielsen. Nakað seinni varð Vitalij tikin.

Fyrradagin kom hann fyri rættin. Hann greiddi frá, at hann mintist ikki, hvat hendi tað kvøldið, har myrdi Peter Nielsen, men hann viðgekk seg kortini sekan. Í rættinum varð hann spurdur, um hann var sinnaður at biðja um umbering fyri tað, sum hann hevði gjørt. Vitalig sat leingi og tagdi. So segði hann:

- Eg havi samkenslu við teimum trimum børnunum, sum hava mist pápan.

Seinnapartin í gjár skuldi rætturin fella dóm. Sveisiska ákæruvaldið kravdi tólv ára fongsul, men verjin helt trý ár vera nóg mikið.

# CIA skal hava loyvi at fara illa við fangum

**Amerikanska Senatið hevur samtykt, at fangar skulu fáa sømiliga viðferð, men Hvítu Húsini krevja, at samtyktin skal ikki umfata fregnartænastuna**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Samtyktin hjá Senatinum kom í sambandi við ta árligu játtanina til verjuna, og sjálvt um Hvítu Húsini høvdu boðað frá, at forsetin fór at nýta sýtingarrættin ímóti samtyktini, atkvøddu 90 senatorar fyri og bara níggju ímóti.

Tað var republikanski senatorurin John McCain, sum tók stig til samtyktina, og sambært New York Times fekk hann fyri nøkrum døgum síðani vitjan av Dick Cheney, varaforseta og Porter Goss, sum er stjóri í CIA. Teir báðir royndu at fáa McCain at góðtaka, at forsetin broytir orðalagið í samtyktini, soleiðis at hon bara umfatar amerikanska hervaldið og ikki fregnartænastuna. Men sambært blaðnum vildi McCain ikki slaka. Tað er tó ikki vist, at uppskot hansara kemur í gildi, tí tað skal eisini samtykkjast í Umboðsmannatinginum, og har eru fleiri ímóti tí.

Fleiri fyrrverandi amerikanskir herleiðarar hava sagt seg taka undir við uppskotinum hjá John McCain. Teirra millum eru fyrrverandi uttanríkisráðharrin Colin Powell og John Shalikashvili, sum báðir hava verið formenn í ovastu amerikonsku herleiðsluni.

Higartil er eingin CIA-maður skuldsettur fyri ágang ímóti fangum í Irak ella Afghanistan, men Washington Post skrivaði fyrr í vikuni, at starvsmenn hjá fregnartænastuni hava havt samband við fleiri tilburðir, har fangar eru deyðir í Irak. Blaðið vísir eisini á, at í rættarmálum ímóti hermonnum er tað komið fram, at CIA hevur ábyrgdina av einari skipan, sum millum annað hevur við sær, at fangar "hvørva" í amerikonskum fangalegum í Irak.